## VIÐMERKINGAR

# Vegurin ímillum Skála og Strendur gerast liðugur!

TUMMAS ELI
HØJ JOENSEN

**Viðmerkingar til greinina hjá Áka Bertholdsen og til okkara umboðan á tingi.**

Hettar ljóðar sera áhugavert; men ikki fyrr enn 2013, álvara tos!

Tað tykist sum, at Sambandsflokkurin nú skal hava æruna fyri, at vegurin verður gjørdur, og tí eru nakrar viðmerkingar gjørdar, ið vísa til hvussu nógv ein politiskur flokkur kann sova og hvussu leingi. Samfelagið byrjaði av álvara at útbyggja samferðslukervið í 1970, tá í Atli P. Dam sáli, gjørdist løgmaður.

Spurnartekin kunnu tí setast við fylgjandi:

**1.** Eru hesi umleið 2000 fólkini á vestara armi so glað fyri at bíða líka til ár 2013, áðrenn tey fáa ein veg, ið vinnulívið og øll vit onnur kunnu brúka?

**2.** Hví er ikki ein verklagslóg gjørd beinanvegin, tá Sambandsflokkurin kom til um tað nú er so, at teir nú skulu hava æruna fyri vegin?

**3.** Áki skrivar, at vegastrekkið er liðugt í 2008/2009 (Strendur-Skála). Var á einum fundi í bygdahúsinum á Strondum herfyri, har LV kunnaði um ætlanina og skilti eg á lagnum, at teir, ið gera vegin nú, longu eru lidnir á sumri 2007. Hví skal so bíðast til 2009?

**4.** Hví eru vit komin heilt til 2006, áðrenn Sambandsflokkurin vaknar? Var ikki brúk fyri vegnum í 1980 til dømis ella ...... hvat ár eg nú skal nevna.

**5.** Økið, vestara síða er seigpínt á vinnulívsøkinum. Eingin vinnulívsmaður við síni fullu fimm fer at hava treylarar koyrandi ímillum Skálabotn og Strendur, tá hann veit, at fimti hvør túrur endar í grøvini og einum knústum bili! Hví hevur Sambandsflokkurin ikki sæð hettar fyrr enn nú? Hvat hevur fingið eyguni at opnast, sum á kettlinginum, tá hann er viku gamal? Persónliga eri eg sera skuffaður um, at flokkurin í tí stóra og heila ikki hevur loyst hetta mál fyri langt síðan; men atkvøðurnar flógva framvegis í posanum, hóast vestara síða ongan veg fær fyrr enn 2013! Sambandsflokkurin, 2013 er avgjørt ikki gott nokk eftir míni metan! Sambandsflokkurin hevur so ruddiliga sovið í tímanum, hetta meti eg, er sera skuffandi.

**6.** Hvussu leingi var tað nú at vit høvdu umboðan á tingi, og hvat gav tað? Er tað gott nokk, at valevni sita á tingi í nógv Harransár og so at siga bert eru landspolitikkarar. Onkur kann kanska halda, at tað eru kommunu-politikararnir, ið skulu syrgja fyri, at gongd kemur í. Kommunupolitikarar byggja ongan landsveg, kunnu kanska ávirka ein landspolitikara, men tað hjálpir lítið, tá kommunal-politikarin eisini er sambandsmaður og tí ikki sær skógin fyri berum trøum, hann er jú vanur við trillibøruna, og hon passar fínt á vegin, hví so heita á ein líka so blindan landspolitikarar, og hvat skal áheitanin vera um?

**7.** Knappliga er tað ein Leirvíks-tunnil, ið hevur vakt onkran smbandsmann. Stórar yvirskriftir bæði í bløðunum og legg merki til, eisini í Dag og Viku, at nú skal Sambandsflokkurin syrgja fyri, at leirvíkingar fáa ein tunnil! Legg merki til, at eg avgjørt ikki havi nakað ímóti, at tey fáa tunnil. Spurningurin frá mínari síðu er, hvar vóru tær stóru yvirskriftirnar skrivaðar av Sambandsflokkinum, tá ráddi um vegin Skálabotnur – Strendur?

**8.** Eg kann best lýsa tykkum støðu Sambandsfloksins við at vísa til bókina hjá Heðin Brú »Tað stóra takið«. Sambandsflokkurin er tann gamli bóndin, ið vil hava alt á vestaru síðu at vera sum tað altíð hevur verið, ímeðan eg, sum kommunal-politikari, í hugsunarhátti og vilja til at nakað skal henda, eri at rokna sum bygdarfólkið, lærarin og sýsluformaðurin, tey vildu altíð adoptera eitt gott framburðs-uppskot, ja kanska enntá skumpa undir fólkið soleiðis, at nakað hendir og tað skuldi verða skjótt. Les so bókina at enda og samanber so bygdina frá byrjan til enda; men í tíni samanbering, skalt tú ikki gloyma, at bóndin er Sambandsflokkurin. Hvør kom betur frá tí, bóndin ella bygdin?

Ætlan mín við hesi grein er, at vekja flokkin, sum hevur livað av stemmunum á vestaru síðu, líka síðan Sambandsflokkurin var stovnaður. Umboðanin hevur lokalpolitiskt ikki verið góð nokk, og tí sita vit sum vit sita. Hava ein veg, sum í støðum kann brúkast! Ein kemur næstan til at hugsa um veðurtíðindini. Í støðum er vegurin brúkiligur men...

2013 er ikki gott nokk!

# Kinna, Kinna – tú gert tær ónáðir og stríð av mongum; tá ið tú gevur fólkinum tað, sum Kinna vil hava

DÁVUR
WINTHER



Tað er vandamál, at ein tilvildarligur persónur sleppur í so ríkiligt mát at siga og meta um, hvat er list, og hvat hon ikki er Hvat er gott og hvat er vánaligt?

Í meting síni av málningaframsýning í Focus, sum í hesum døgum hýsir Frits Johannesen, legði Kinna Poulsen seg á ein heldur negativan bógv: Frits var amatør og málaði fjákutar krokudillur til eitt virði av tveimum stjørnum.

At siga, at Frits er amatørur – og at siga at Frits er autodidaktur ella sjálvlærdur, er hvør sítt. Serliga tá ið hugsað verður um tað negativa rákið, sum búið undir útsøgnini.

Frits málar ikki bert málningar, hann málar skaldskap og aftanfyri hvønn málning liggur ein longri søga, sum Kinna kundi ómakað sær at spurt um.

Minnist ein málning, Frits málaði á listaskúlanum, hann gekk á í Danmark.

Myndevnið var: Ein hending og eitt upplivilsi. Myndin var av nøkrum muslimskum kvinnum, sum tú sást bakið á, sitandi í einum av býarbussunum í Keypmannahavn. Ein maður stígur inn í bussin. Hetta er William Heinesen. Í speglinum sært tú, at bussførarin er Niels Midjord (Niels á Høvdanum, sum vit plaga at siga).

Tá ið skúlafelagarnir hjá Frits spurdu, hvat málningurin ímyndaði, mundu teir og lærarin ikki komið yvir hugflogið og sjálvsomu samansetingina, sum var rámandi saman við teirri søgu, sum Frits greiddi frá.

Tí er ein mynd ikki bert eitt málað lørift! Kinna kundi ómakað sær at spurt um "innihaldið" í málninginum. Hví er krokudillan fjákut í eygum Kinnu? Skuldi tað kanska heldur verið ein geldær frá heimliga umhvørvinum? – Hevði hon passað betur inn í hugaheimin hjá Kinnu? Ella hóskar krokudillan kanska betri til klaveriaturið og samansetingina av myndini annars?

Vincent van Gogh var ikki lærdur málari! Hann var "amatørur"! Sama var við Paul Gauguin.

Per Kirkeby er geologur – ikki lærdur málari – Bjørn Nørgård heldur ikki!. Teir eru glaðir "amatørar"! (vælvitandi, at teir hava gingið á X-skúlanum – ikki á akademinum).

Torbjørn Olsen, Anker Mortensen og Bárður Jákupsson eru ikki útbúnir – Soleiðis kundi eg hildið áfram..

Tað óhepna við Kinnu er, at hon er so einsamøll í ummælaraleiklutinum: Hon er allastaðir, í bløðum, útvarpi og sjónvarpi. Á henda hátt kann hon tykjast "almóðirlig", alvitandi og mátsetandi fyri, hvat góð list er.

Eg ivist tó onga løtu í, at Frits og fleiri við honum, sum Kinna kallar amatørar, hava lisið hópin meira um list og listasøgu, enn Kinna hevur lisið.

Og so at seta Dávidsstjørnu ella eina aðra á, sum mátieind – á eina málningaframsýning, tað tykir mær ósømiligt, undarligt og meir kommersialiserað, enn gott er.



*Myndin er sett saman av einum amatørfotografi, Dáva Winther*

Tað plagar at verða tikið til, at "Tú býrt í glashúsi". Soleiðis haldi eg kann sigast í hesum føri. Tað er vandamál at gríta við gróti í listaheiminum. Tí skalt tú vanda tær um, tá ið tú kallar listafólk, sum tey flestur eru góður við og síggja upp til, fyri amatørar.

Tó kann vera, at Frits ikki passar inn í glashúsið, har bert tey hámettu og lystinlærdu halda til saman við Kinnu. Ivist bert í, um Frits er so illa farin av teirri grund.

Frits er sjálvlærdur og hegnigur á sínum málningapalli. Hann hevur nógvar fyrimyndir, men er tó – í øllum, hann ger – sín egin.

Eg eri komin nógv í málingarúm hansara gjøgnum árini. Har hópast ikki upp við málningum – Teir verða seldir, so hvørt teir eru lidnir. So onkrum hóvar teir! Ja, eg veit um fleiri, sum eru góð við teir, og kalla teir fyri "sálina" í heimum teirra. Hesi mugu so bara vera reinir amatørar ella bara glaðir amatørar á njótarastigi!?

Tað hoyrist, at Frits hevur selt at kalla allar málningarnar í Focus. Tí mugu vit ásanna, at øll tíbetur ikki eru samd við Kinnu.

Frits er ein glaður "amatørur", sum kann kveikja lív í ta mest vandamiklu "krokudilluna" til gleði fyri okkum vanligu deyðiligur. Og tað fegnast vit um. Hetta nýtist Frits heldur ikki at vera vánaligur listamaður av.

Betur er bøtandi hond enn spillandi tunga, kundi tú eisini sagt – Serliga við ein amatør.

Eg kann ikki bara mær at heita Kringvarpið, um at vanda sær betur um "málið".